# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Johan ímóti teimum yngru




*Felags fyri avbjóðararnar hjá Johan Nielsen er, at teir allir eru undir 40 ára aldur*

**Ungir og lutvíst óroyndir venjarar skulu taka dystin upp við mest roynda og vinnandi venjaran í føroyskum fótbólti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einsamallur hevur Johan Nielsen vunnið meira, enn tey flestu innan føroyskan fótbólt yvir høvur kunnu droyma um. Royndi venjarin, sum nú eisini hevur leitt NSÍ til FM-gull, átti undan hesum 10 FM-gullmerki, ið vóru vunnin við HB og GÍ. Og á Skála var tað eisini heilt nær við, at hann gjørdi sama kynstrið fyri tveimum árum síðani.

Tí er einki forgjørt í, at hann av flestu fótbóltskønum verður mettur sum dugnaligasti venjarin í landinum. Og tað er einki at ivast í, at tey í Runavík eru sera fegin um, at undirskrift eisini er sett á sáttmálan fyri komandi kappingarár.

## Kapping frá ungum venjarum

Umframt Johan Nielsen, so hava eisini sjey aðrir venjarar skrivað undir sáttmála fyri komandi kappingarár. Og felags fyri allar hesar er, at teir avgjørt teljast millum yngra ættarliðið innan føroyska fótbóltsvenjing.

Eingin teirra er enn farin um tey 40, og av meistaraheitum og steypasigrum er tað ert Sigfríður Clementsen, sum hevur nakað at vísa á sum venjari. Hetta við meistaraheiti og steypasigri við B36 ávikavist í 2005 og 2006.

Hinvegin hava fleiri av venjarunum roynt at staðið við gulli sum spælarar. John Petersen (1994, 1995, 1996, 1997 og 2001), Rúni Nolsøe (1997, 2002, 2003 og 2004) Eyðun Klakstein (1991 og 1999), Sigfríður Clementsen (1997) og Eli Hentze (1989), hava síni gullmerki at vísa á sum spælarar. Men nú verður tað sum venjarar, at teir skulu taka dystin upp við garvaða veteranin.

## FAKTA

### Teir átta settu

| Venjari | Felag | Ár |
|---|---|---|
| Bill M. Jacobsen | B68 | 33 |
| Jón Simonsen | ÍF | 34 |
| Sigfríður Clementsen | EB/S | 34 |
| Eyðun Klakstein | KÍ | 34 |
| John Petersen | Skála | 35 |
| Rúni Nolsøe | HB | 36 |
| Eli Hentze | B71 | 38 |
| Johan Nielsen | NSÍ | 67 |

# Gott við ættarliðsskifti

**Johan Nielsen tekur fegin móti avbjóðingini, sum nú kemur frá einum nýggjum ættarliði av føroyskum fótbóltsvenjarum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann tóktist ikki hava givið tí gætur. Men spurdur, hvat hann sigur til støðuna, nú tað bert eru føroyskir avbjóðarar til komandi Formula-kappingina, sigur Johan Nielsen, at tað heldur hann bara vera gott.

- Eg haldi tað vera gott fyri føroyskan fótbólt, at eitt ættarliðsskifti tykist vera ávegis. Kanska hava vit í ov stóran mun dúva upp á útlendskar fenjarar gjøgnum fleiri ár. Ikki tí. Tað hava nú eisini verið ár, har vit hava verið nógvir føroyingar, men generelt haldi eg, at feløgini kanska hava satsað ov nógv upp á tað útlendska.

- Tað vildi so ikki verið nakar, sum hevði funnið upp á at leitað uttanlands eftir einum skipara til føroyskt fiskiskip, so eg dugi ikki at síggja, hví vit ikki eisini skulu brúka okkara egnu venjarar.

## Ov lítið álit

At tað bert er Johan sjálvur, sum framvegis er í fremstu røð av teimum eldru venjarunum, gevur eisini ábendingar um, at føroyskir venjarar ikki halda serliga leingi í yrkinum. Og sjálvur heldur Johan, at hetta kann tulkast sum vantandi álit frá føroysku feløgunum.

- Tey velja í fleiri førum heldur at satsa upp eina útlendska loysn. Og eg haldi ikki, at hon altíð er tann rætta. Og tí er tað kanska ikki heilt rættvíst, tá álitið á føroysku venjarunum er somikið lítið. Við krøvunum, sum nú verða sett, so hava føroysku venjararnir eina sera góða útbúgving. Men fáa teir ikki neyðugu royndirnar, er trupult at hava nakað at vísa á, heldur hann.

## Ringt at peika avloysaran

Tað verður helst trupult hjá nøkrum venjara at taka dystin upp við Johan, um tosast skal um tal av heiðursmerkjum. Og sjálvur vil hann illa seta navn á, tá vit spyrja hann, hvørt hann roknar við, at nakar av teimum higar til sjey kappingarneytunum verður ein venjari, sum vit koma at síggja heilt nógv til komandi árini.

- Tað verður óluksáliga trupult. Kanska fyrst og fremst, tí vit venjarar ikki síggja so nógv til tað arbeiði, sum vit hvør í sínum lagi gera. Men ein maður sum Sigfríður hevur longu verið nógv at sæð til. Og tað verður tað kanska eisini komandi árini.